búst**aðir**
Føroya bústaðarfelag

# Yvirskipaðar húsrelgur fyri íbúðir hjá Bústøðum – Føroya Bústaðafelag

**Alment**
Hesar húsreglur eru tær yvirskipaðu húsreglurnar hjá Bústøðum – Føroya bústaðafelagi. Býlingar kunnu hava sínar egnu húsreglur.

**§ 1 Útlufting**
Fyri at sleppa undan fuktskaðum skulu øll rúm haldast turr. Týdningarmikið er, at luftað verður út hvønn dag. Tað er neyðugt at lufta væl út við matgerð (nýta eymhettuna) at lufta væl út í baðirúminum eftir bað, at nýta turkitrumlu, ella at turka vaskiklæðir úti, og ikki at turka vaskiklæðini inni.

**§ 2 Rusk**
Húsarhaldsrusk skal koyrast í plastposar í ruskbingjurnar, sum eru uttan fyri íbúðarbygningarnar. Tey, sum leiga, hava sjálv ábyrgd av at beina fyri vandamiklum burturkasti, so sum glasi, battaríum og øðrum. Tað er ikki loyvt at seta rusk ella annað órudd í trappugongd, felags inngongd ella felagsøki. Sigarettstubbar og líknandi skulu beinast burtur og mugu ikki tveitast á felagsøkið.

**§ 3 Húsdjór**
Hvørs tað er loyvi at hava húsdjór, eru reglur fyri hvønn býling sær. Djór, sum eigarin heldur í búrum og akvarium, roknast ikki sum húsdjór og eru loyvd í øllum íbúðum. Ikki er loyvt at hava skriðdjór. Førarahundar eru tó altíð loyvdir.

**§ 4 Súkklur, barnavognar og annað**
Súkklur, barnavognar og annað tílíkt skulu standa inni á egnum øki ella øki, sum er ætlað til tað, og mugu av trygdarávum undir ongum umstøðum setast í trappur, á gangin ella á onnur felagsøkir og mugu ikki vera til ampa fyri aðrar leigarar.

**§ 5 Akfør og parkering**
Bilar og onnur motorakfør eiga at parkerast, har pláss er gjørt til tað og soleiðis, at tey ikki eru til ampa fyri onnur. Tað er ikki loyvt at parkera framman fyri felags inngongdum ella ruskbingjum. Tó er av- og áskipan loyvd.

Bilar uttan nummarspjøldur, húsvognar og líknandi skulu ikki setast á parkeringsøkið.

**§ 6 Tónleikur og larmur**
Fyri at hava so gott grannalag sum til ber, eiga leigararnir til eina og hvørja tíð at vera hampilig yvir fyri hvørjum øðrum. Náttarfriðurin skal virðast. Hetta merkir, at friður er millum kl. 22 og kl. 7, og tá er til dømis ikki loyvt at nýta larmandi amboð ella at spæla harðan tónleik uttan so, at tað er avtalað við grannarnar frammanundan.

**§ 7 Trappurúm**
Trappurúmini eru ikki til spæl, renning ella larm. Har skal ikki vera óneyðugur gangur.

**§ 8 Ábyrgd og tryggingarviðurskifti**
Bústaðir – Føroya bústaðafelag tryggjar allar sínar bygningar. Allir leigarar hava ábyrgd av at tryggja sínar egnu lutir.

**§ 9 Siðiligheit**
Allir leigarar eiga at vísa tol og virðing fyri øðrum leigarunum. Leigararnir hava ábyrgd av, at gestir eisini yvirhalda húsreglurnar.
Um so er, at ein leigari ber seg hóttandi, ófantaliga ella harðliga at móti øðrum leigara ella móti umboði frá Bústøðum – Føroya bústaðafelagi, kann hetta hava við sær, at leigumálið verður uppsagt alt fyri eitt.

**§ 10 Viðgerð av klagum**
Leigararnir hava rætt at klaga um atburðin hjá øðrum leigarum í sama býlingi. Klagur skulu sendast skrivliga til Bústaðir – Føroya bústaðafelag.

**§ 11 Gildiskoma**
Hesar húsreglur eru góðkendar av stýrinum fyri Bústaðir – Føroya bústaðafelag, og eru galdandi frá 18. februar 2014. Bústaðir – Føroya bústaðafelag tilskilar sær rætt til einsíðugt at broyta hesar húsreglur.